## Bussførarin skuldsettur

Løgreglan í Týsklandi heldur, at ov nógv ferð var orsøkin til ta donsku bussvanlukkuna nærhendis Berlin um vikuskiftið. Sum skilst helt bussurin seg niðan fyri hámarksferðina á staðnum, men týska løgreglan sigur, at hann koyrdi ov skjótt eftir umstøðunum, tí tað var hált. Tí hevur týska ákæruvaldið skuldsett bussføraran fyri óviljað manndráp. Ein talskvinna fyri ákæruvaldið sigur kortini, at tað er ikki vist, at bussførarin verður ákærdur. Tann 49 ára gamli bussførarin fekk so mikið stóran skaða í vanlukkuni, at hann er enn á sjúkrahúsi í Týsklandi.



## Vónar semju um rækjur

Grønlendsk rækjuskip hava eins og tey føroysku fingið forboð fyri at koma í kanadiska havn orsakað av ósemjuni landanna millum um rækjukvoturnar. Grønlendski landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Ane Hansen (myndin), heldur lítið um avgerðina hjá kanadiska starvsbróðurinum um havnastongsul, og hon hevur skrivað grønlendska ráðharranum bræv og skotið upp, at tær báðar hittast at tosa um málið. Ane Hansen sigur við KNR, at hon vónar, at ósemjan kann loysast á næsta fundinum í NAFO.

# Vónin við í stórari verkætlan í Kanada

**Saman við Marine Institute í Nýfundlandi skal trolvirkið Vónin arbeiða við einari sera umfatandi verkætlan, sum skal minka um ávirkanina, sum botntrol hava á botnin. Samlaði kostnaðurin á verkætlanini er mettur at verða 22 milliónir krónur**

VINNA
*Eirikur Lindensov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hendan verkætlanin hevur vakt stóran ans í Kanada, og hevur Atlantic Innovation Fund (AIF), sum er ein grunnur hjá tí kanadiska statinum, valt at stuðlað hesari verkætlan við nærum 10 milliónum krónum. Stuðulin frá AIF var almannakunngjørdur av kanadiska verjumálaráðharranum, Peter Mackay, á einum tíðindafundi á Marine Institute 31. januar. Umboð fyri Vónina vóru eisini til staðar á tíðindafundinum.

Málið við verkætlanini er at menna botntrol, sum skulu hava minni ávirkan á botnin, men framvegis fiska væl. Úrslitið verður nýggj útgerð, sum verður meira umhvørvisvinarlig.

Tey komandi árini verður tað væntandi eitt krav frá nógvum av heimsins londum at umhvørvisvinarlig botntrol verða nýtt. Við at vera við í hesari verkætlan væntar Vónin at kunna menna botntrol, sum koma at liva upp til hesi krøv.

- Í staðin fyri bara at standa á síðulinjuni og bíða til hesi krøv koma yvir okkum, so hava vit valt at tikið av møguleikanum at vera við í hesari stóru verkætlan, tí vit hava ábyrgd sum trolvirki at finna nýggjar og betri loysnir, sigur Hjalmar Petersen stjóri á Vónini.

Bólkurin, sum kemur at taka sær av verkætlanini, er settur saman av verkfrøðingum, havfrøðingum, fiskiskiparum og umboðum frá Vónini, sum koma við sínari vitan um trolreiðskap.



Ætlanin er at verkætlanin fer í gongd í apríl 2010, og at hon skal verða liðug í mars í 2015. Tá verkætlanin er liðug, hevur Vónin einarætt at brúka úrslitini vinnuliga.

Vónin er saman við norska RFG partur av VON samtakinum, og saman hava feløgini 17 deildir í Føroyum, Grønlandi, Kanada og Norra. Tað starvast dagliga umleið 200 fólk hjá VON samtakinum.

# Skiftivaktir eru av tí ónda

**Mikukvøldið klokkan 19 heldur norski læknin Magnar Kleiven fyrilestur í Miðlahúsinum um skiftiarbeiði, sum kann hava við sær nógvar ymiskar sjúkur. Fólk skulu arbeiða so fáar nætur á rað, sum gjørligt. Hetta eru fremstu ráðini**

HEILSA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Fyri at vera vakin um dagin, mugu vit sova um náttina. Um dagin arbeiða vit og gera ymist annað. Náttin skal brúkast til at hvíla okkum og droyma.

Tað er ikki óvanligt at hoyra gremsa seg um náttarvaktir, tí tað er so torført at koma aftur á beint við svøvni.

Skiftivaktir fara illa við fólki, og tað fer norski læknin Magnar Kleiven at tosa um í fyrilestri sínum í Miðlahúsinum. Fyrilesturin verður mikukvøldið klokkan 19.

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur fingið læknan at koma til Føroya at lýsa hetta evnið.

Tað ber ikki til at loysa øll fólk frá at arbeiða um náttina, men tað ræður um at gera korini so lagalig sum gjørlig og forða langtíðaravleiðingum, sigur Magnar Kleiven.

Nógv er granskað í spurningum um, hvat skiftivaktir gera við fólk. Granskingin hevur kveistrað allan iva burtur um, at tað fer illa við heilsuni at vaka fleiri nætur á rað. Tað hendir nakað við hormoninum melatonin í epifysuni.

### Ávirkar alt lívið

Avleiðingarnar av langtíðar skiftiarbeiði eru nógvar.

Tað ávirkar familjulívið, og hjá nógvum endar tað við hjúnarskilnaði. Skiftisarbeiðarar hava ikki líka góðar stundir sum onnur til ítriv og at luttaka í tiltøkum. Kanningar vísa, at tey fólkini sjáldnari enn onnur eru heima vegna sjúku, tí gátt teirra til tað er hægri.

Skiftisarbeiðarar hava ofta magasár, og tað kemur ikki bara av at drekka nógv kaffi og roykja nógv um náttina.

Hesi fólkini sova ofta illa, eru meira ótafull og ill í sær, men tey eru ikki sálarsjúkari enn onnur, sigur Magnar Kleiven.

Kvinnur, sum arbeiða skiftivakt, missa oftari enn aðrar kvinnur fostrið ella eiga ov tíðliga.

### Nógvar sjúkur

Skiftisarbeiðarar fáa oftari enn onnur hjarta- og æðrasjúkur. Eisini fáa teir oftari enn onnur krabbamein, so sum brostkrabba hjá kvinnum, prostatakrabba hjá monnum, og galdandi fyri bæði kynini er 'øktur títtleiki av krabbameini í tarmunum og maganum.

Men tað ber nakað til at forða øllum hesum sjúkum hjá skiftisarbeiðarum.

Fyrsta boð er at arbeiða so fáar nætur á rað, sum gjørligt. Arbeiða fólk meira enn fýra nætur á rað, mugu tey hava eina heila viku til at koma aftur á beint við svøvni. Tvær náttarvaktir á rað krevja ein dag frí. Vaktarskipaninir eiga at verða lagdar soleiðis, at tað helst ikki eru fleiri náttarvaktir á rað.

Í fyrilestri sínum kemur Magnar Kleiven eisini inn á nógv annað, sum kann gera lívið hjá skiftisarbeiðarum betri.

### Arbeiðsgleðin

- Ein góð kanning vísti fyri nøkrum árum síðan, at arbeiðsgleði hevur størri týdning fyri at fyribyrgja hjarta- og æðrasjúkum enn bæði kostur, royking og tað at røra seg, sigur Magnar Kleiven, sum hevur sum motto, at tað skal vera deiligt at arbeiða.